Sjódeildin:

# Vit hyggja út um landoddarnar

**- Grønland hevur verið hildið at liggja langt burturi, men vit hava nógv tilknýti til fleiri av grønlendsku skipunum, sum partvís hava føroyska manning. Tað er lítil munur á teirra skipum og okkara. Vit hyggja út um landoddarnar, men enn er ov tíðliga at siga nakað um, hvat – ella um nakað - fer at spyrjast burtur úr, sigur Hákun Steingrímsson, deildarleiðari á Sjódeildini hjá Tryggingarfelagnum Føroya**

Tryggingar
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Herfyri fekk Sosialurin eitt "tips" um, at Sjódeildin hjá Tryggingarfelagnum Føroyar, sum áður gekk undir navninum, Sjóvatryggingin, hevur í umbúna at tryggja nakrar útróðrarbátar, sum eru bygdir í Føroyum og seldir einum felag í Grønlandi.

Hákun Steingrímsson, deildarleiðari á Sjódeildini, sigur, at tey ikki eru farin at tryggja útróðrarbátar í Grønlandi, men váttar, at tey eisini hyggja at møguleikum fyri tryggingum uttanfyri landoddarnar.





*Hákun Steingrímsson vil hvørki vátta ella avsanna, at Sjódeildin hevur fingið fyrispurningar um tryggingar av útróðrarbátum í Grønlandi, sum eru bygdir í Føroyum*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Spurdur, um hann vil vátta, at fyrispurningur er komin um at tryggja nevndu útróðrarbátar, sigur Hákun, at hann hvørki vil vátta ella avsanna hetta í løtuni.

Sosialurin skilir tó á vælvitandi keldu, at Sjódeildin hevur fingið fyrispurning um tryggingar í Grønlandi.

### Hyggja út um…

Hákun Steingrímsson sigur, at Sjódeildin at kalla bara tryggjar skip og bátar undir føroyskum flaggi – og eisini skip, sum í eina tíð eru undir øðrum flaggi.

- Fara føroysk skip undir annað flagg í eina tíð, fylgja vit vanliga skipunum, tí vit meta, at hetta hevur týdning fyri føroysk áhugamál, sigur hann.

Deildarstjórin leggur tó aftrat, at verður eitt føroyskt skip, sum í eina tíð hevur siglt undir øðrum flaggi, selt til eitt nú Spaniu, hevði tryggingin ikki fylt skipinum.

- Føroyar eru eitt avmarkað samfelag í vavi. Vit vita av hvørjum øðrum – og kenna hvønn annan. Slík viðurskifti broytast, tá ið farið verður langt út um landoddarnar.

*- Fara føroysk skip undir annað flagg í eina tíð, fylgja vit vanliga skipunum, tí vit meta, at hetta hevur týdning fyri føroysk áhugamál, sigur Hákun Steingrímsson, deildarleiðari á Sjódeildini hjá Tryggingarfelagnum Føroyar*

Hákun dylur tó ikki, at Sjódeildin hyggur út um landoddarnar og metir um teir møguleikar, sum eru.

### Kanska seinni…

- Grønland hevur verið hildið at liggja langt burtur, men havandi í huga tað tilknýti og tey áhugamál, sum føroyskir fiskimenn hava í Grønlandi, hyggja vit eisini at hesum møguleikum.

Í løtuni torir hann tó einki at siga um, hvørt Sjódeildein í framtíðini fer undir munandi tryggingarvirksemi í okkara grannalondum.

- Sum er, dugi eg ikki at siga meira um hesi viðurskifti, men kanska verður okkurt at frætta seinni, sigur Hákun Steingrímsson, deildarleiðari, at enda.

# Ikki loyvt at innflyta kyrkingarslangur og bardagahundar



*Eddie, sum er ein frensur í Havn, er komin úr Ameriku*
*Mynd: Óli Rubeksen*

**Eftir at løgtingslógin um djórasjúkur kom í gildi í 2001, varð almenna húsdýranevndin tikin av, samstundis sum Heilsufrøðiliga Starvsstovan fekk ábyrd av eftirlitinum við innflutningi av húsdjórum til Føroya**

Innflutningur
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Broytingarnar, sum komu í kjalavørrinum av, at húsdýranevndin varð tikin av, ørkymlaðu nógvar bøndur. Teir stúrdu fyri, at ein sonn flóðalda fór at verða av alskyns dýrasløgum, ið ikki frammanundan hava verið vanlig í Føroyum. Ein aðalfundur hjá Meginfelag Búnaðarmanna tók um hetta mundið undir við eini áheitan frá nevndini um, at limirnir ikki fóru undir innflutning av neytum. Tískil eru heldur eingi neyt skrásett at verða innflutt til landið uttan skotsku hálendisneytini í Koltri.

Ingibjørg Egholm, djóralækni, hevur vegna Heilsufrøðiligu Starvsstovuna, eftirlit við innflutningi av øllum kríatúrum, og hon hevur galdandi kunngerðir á økinum at arbeiða eftir.

### Slangur og hundar

Ein av kunngerðunum, sum er galdandi á økinum, er ein kunngerð um eksotisk dýr. Her er ein listi yvir dýr, sum eru bannað at flyta inn, og millum hesi teljast eitt nú bardagahundar og kyrkingarslangur.

Sambært blaðnum, Bústólpi, sum Meginfelag Búnaðarmanna gevur út, hevur rákið verið, at fólk vilja hava ymisk sløg av kríatúrum.

- Fólk fara langt fyri at finna sær hund ella kettu, ið onnur ikki hava. Dýrini koma vanliga úr okkara grannalondum og Skotlandi, sjálvt um tey hava sín uppruna aðrastaðni á knøttinum. Tað er eisini komið fyri, at onkur hundur er komin longu leiðina beinleiðis úr Ruslandi!

### Ókend árin…

Blaðið veit at siga, at tað finnast eingi hagtøl og skjalatilfar um, hvørji árin hesin økti innflutningur hevur á heilsustøðuna hjá húsdýrahaldinum í Føroyum.

- Tó verður sagt, at snýkar og ormasløg eru funnin, sum eingin áður hevur vitað um, skrivar Bústólpin.

**Innflutningur av húsdjórum í tíðarskeiðinum 2002-2005:**

| Djóraslag | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 |
|---|---|---|---|---|
| Kettur | 12 | 8 | 16 | 11 |
| Hundar | 88 | 90 | 88 | 30 |
| Ross | 22 | 13 | 16 | 3 |

*Kelda: Heilsufrøðiliga Starvsstovan*



## Tríati ár í ferðavinnu

Ferðavinna
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í morgin, 1. juli, hevur Maria á Lofti í Sandavági starvast innan føroysku ferðavinnuna í tríati ár.

Øll árini hevur "basin" hjá henni verið Flogvøllurin í Vágum.

Tey fyrstu 17 árini var Maria í starvi hjá Flogfelag Føroya, og seinni hevur hon havt ábyrgdina av sølu- og marknaðardeildini hjá Atlantsflogi.

Maria, sum er gift Kára á Lofti, er sera fryntlig og gongur við lív og sál upp í sítt arbeiði.